# Morris Oxford koyra í

**Ein tann kendasti bilurin og ímyndin av ferðsluni í India er Hindustan Ambassador, sum upprunaliga er ein Morris Oxford frá 50-unum. Bilurin verður framleiddur enn og eitur í dag Hindustan Avigo**

Eins og London Taxi í Onglandi er Hindustan Ambassador eitt sereyðkenni fyri fersluna í India.

Tá vit síggja myndir ella sjónvarpsupptøkur úr gøtunum í India, eru hýruvognarnir Hindustan Ambassador so at siga altíð við á myndunum. Mong tilkomin og eldri fólk halda seg kenna hesar bilarnar, tí teir hava eisini verið partur av gøtumyndini í Føroyum sum Morris Oxford, ið Sigird av Reyni seldi í 50-unum.

Hindustan Motors Limited varð stovnað í 1942. Best kendi Hindustan er Hindustan Ambassador, sum í veruleikanum er ein Morris Oxford frá 1956. Tað var bilverksmiðjan BMC (British Motor Corporation Ltd.) í Onglandi, sum framleiddu Morris bilarnar.

Hindustan Contessa er ein fyrrverandi enskur bilur, nevniliga Vauxhall, sum vórðu gjørdir frá 1972 til 1978 sum Vauxhall Victor og Vauxhall VX. Hindustan Contessa sum vóru gjørdir fra 1982 til 2002 høvdu ein japanskan Isuzu motor.

Hindustan Motors er ein stór bilverksmiðja, har arbeiða um 4.000 fólk. Í dag gera teir eisini bilar í samstarvi við Mitsubishi.

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Hindustan Ambassador hýruvognarnir eru eitt sereyðkenni fyri fersluna í India*



*Vanlig gøtumynd í India, ein hópur av Hindustan Ambassador hýruvognum*



*Hindustan Ambassador við ljóskastarum og sirenum*




*Morris Oxford frá 1956, ið enn verða gjørdir í India sum Hindustan*